

## Leyst starv

### Sálarfrøðingur

Barna- og ungdómsdeildin hjá Tórshavnar kommunu søkir eftir sálarfrøðingi at byrja 1. august 2007.

**Starvið**
Tann setti verður partur av nýggja toyminum undir B&U deildini, ið arbeiðir við m.a. ráðgeving, fakligari sparring og menningarprojektum í mun til børn á dagstovnum.

**Vit bjóða**
eitt fjølbroytt og spennandi starv innan eitt øki, sum er í stórari menning
- ymiskar og skiftandi fakligar avbjóðingar
- ávirkan á egið arbeiðsøki
- skeið og supervisión
- eitt gott tvørfakligt arbeiðsumhvørvi

**Vit ynskja**
at seta eitt fólk, ið hevur
- útbúgving sum cand. psyk. ella cand. ped. psyk.
- áhuga í og royndir innan smábarnaøkið
- hug og førleika at arbeiða ráðgevandi (konsultativt)
- góð samstarvsevni, opinleika fyri nýhugsan og sjálvstøðugt arbeiðslag

**Starvs- og setanarviðurskifti**
Arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna. Starvið er lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Magistarafelag Føroya.

**Meiri fæst at vita**
við at venda sær til Ingibjørg Berg, trivnaðarstjóra, ella Katrina Petersen, deildarleiðara, tlf. 30 20 10.

**Umsókn**
saman við upplýsingum um útbúgving og royndir og møguligum viðmælum skal vera Tórshavnar kommunu, postsmoga 32, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi 12. juni 2007.

**Toymið**
Toymið undir Barna og ungdómsdeildini er tvørfakligt og hevur virkað síðan august 2006.

Arbeiðsuppgávurnar hjá toyminum eru at samstarva við dagstovnar í kommununi og veita ráðgeving í námsfrøðiligum og sálarfrøðiligum spurningum.

Í løtuni arbeiða tríggir námsfrøðingur og ein sálarfrøðingur í toyminum.

REPROZ

**Tórshavnar kommuna**

---

– heilt og reint

## Ruskinnsavnari til »Roða«

Søkt verður eftir einum ruskinnsavnara til innsavningarbilin »Roða« at byrja mánadagin 4. juni 2007, ella skjótast tilber.

**Arbeiðið umfatar:**
- Innsavnan av húsarhaldsposum og virkisposum
- Annað fyrifallandi arbeiði hjá IRF.

**Krøv til umsøkjaran:**
- Stóra koyrikortið, og vanur at koyra lastbil.
- Kunna arbeiða sjálvstøðugt

Tann ið settur verður í starv kann eisini rokna við øðrum uppgávum innan IRF.

**Galdandi sáttmáli:** Fastlønarsáttmálin millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til IRF tlf. 414243, Adelbert Ellingsgaard.

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi innan hósdagin 31. mai 2007.

***IRF***
*Postboks 39*
*520 Leirvík*

IRF hevur 5 serútgjørdar bilar til ruskinnsavning: Roði, Ryski, Rósa, Reyðsmæra og Viól. Arbeiðsumráðið hjá »Roða« er í Norðoyggjum, Vágum, Norðstreymoy og Eysturoy. Tríggir mans eru við "Roða".

---

## UMSÓKN UM SKEINKILOYVI TIL STØK TILTØK

Umsóknir um skeinkiloyvi til støk tiltøk í summar, eiga at verða Loyvisnevndini í hendi innan 8. juni 2007.

Umsóknir skulu sendast til:

**Politistøðin í Tórshavn**
Att. Loyvisnevndin
J. Broncksgøta 17
Postboks 3018
110 Tórshavn

Saman við umsóknini skal sendast ein tekning, sum vísir økið har ætlanin er at skeinkja, tal av skeinkingarstøðum, umframt ein neyv lýsing av tiltakinum, herundir upp- og afturlatingartíðir.

***Loyvisnevndin***
*Anna Dam, form.*

---

## Søkt verður eftir starvsfólki til mótahandil

til at arbeiða annan hvønn leygardag og avloysa aðrar dagar, feriu og serliga seinnapartar á degnum. Tygum skulu kunna arbeiða sjálvstøðug, hava áhuga og duga at hjálpa kundanum at velja rætta klæðnaplaggi.

Hevur hetta tygara áhuga, eru tygum vælkomin at seta tygum í samband við okkum.

**MARGERITA, SMS**
Á Trapputrøðini · Postboks 1385 · 110 Tórshavn
Tlf. 318787 · Fartlf. 510750 · margerita@kallnet.fo

---

*Merlot søkir eftir*



*Tænarum/servitrisum og hjálparkokki at byrja skjótast tilber.*

*Hevur tú hug at arbeiða í einum spennandi, fjølbroyttum og avbjóðandi umhvørvi, er tað júst tær vit hava brúk fyri.*

*Nærri upplýsingar um størvini fáast við at ringja til 214121*

RESTAURANT
**MERLOT**
Magnus Heinasonargøta 20
FO-100 Tórshavn
Tel (+298) 311121 - Mobile (+298) 214121